


***Nr. 23*** ***8. november 2020*** ***80. árg.***


# Vit vita ikki, hvat ið vit skulu gera

Vit hava ongantíð verið meira bundin at Gudi, enn vit eru nú!

Tá ið ovurmiklir herar úr Móab og Ammon lupu á Jósafat kong í Juda (2. Krýn. 20), stóð honum greitt, at bara Gud kundi bjarga teimum.

Hann minti Gud á lyftið: „Um ein vanlukka kemur yvir okkum, annaðhvørt tað er fíggindaherar, PEST (korona) ella hungursneyð, so skulu vit koma til hetta templið, har tú býrt, og biðja teg um hjálp, **so tú kanst leggja uppí og bjarga okkum**!“

Og víðari bað hann: „Vit eru einki mentir móti einum so ovurmiklum heri, og vit vita einki at gera, **men vit líta á hjálp tína!“**

Gud er hin sami í dag. Tað eru vit, sum hava broytt kós. Tað eru vit, sum hava gjørt okkum leys og hava kvett við Gud, av tí at vit halda, at vit duga sjálv.

Jósafat kongur og judamenn vóru so sperdir, at teir viðgingu: „Vit hava ongan kjans at vinna henda bardaga, og vit vita ikki, hvat ið vit skulu gera!“ Men so komu loysnarorðini, tey bjargandi orðini: „Men Harri, eygu okkara eru vend móti tær.“

Hasa bønina áttu vit øll at biðið, bæði høgur og lágur.

Bønin hjá Jósafati stendur í Gamla Testamenti, men Jesus endurtekur hana í Jóh. 15,5: „Eg eri víntræið, tit eru greinarnar; tann, sum verður í mær og eg í honum, hann ber miklan ávøkst, tí at **uttan meg kunnu tit als einki gera**.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Vandabólkur – trygdarbólkur

Eg meti meg at vera í trygdarbólki. Hví kann eg siga so? Jú, tí Guds orð er fult av undurfullum lyftum.

„Tú skjól mær ert, tú úr vanda mær bjargar." Sálm. 32,7.

Sálmur 61,4–5 hevur eisini eitt undurfult lyfti, serliga tá ið vit hugsa um, hvør ið tað er, sum gevur hetta lyftið: „Tí skjól tú mær ert vorðin, eitt fast torn móti fígginda valdi. Lova mær at gista í tjaldi tínum med alla og fáa lívd í skugga veingja tína."

Tá ið landsins leiðarar og embætismenn teirra halda tíðindafund, verður bara tosað um búskap, sjúku, andingartól, koppingarevni o.t. Og tað er púra í lagi, men onkur trúgvandi átti at verið har og talað nøkur uggandi og trúarstyrkjandi Guds orð, tí menniskjan livir ikki av breyði eina, men av hvørjum orði, sum kemur út úr Guds munni. Menniskjan er ikki bara likam og sál – men eisini ANDI.

Vit eru ikki ein flokkur av køldum robottum, sum bara hava brúk fyri at hoyra um búskap og sjúkur, men okkum er eisini tørvur á at hoyra eitt uggandi og trúarstyrkjandi orð.

Við gomlu múrunum í Jerusalem sum bakgrund ljóðar hetta lyftið: „Skjól mítt og skjøldur tú ert, tínum orðum eg bíði." Sálm. 119,114.

*Effie Campbell* umsetti.

# Korn úr himli

*Mia Hallesby*

Á einum møti í Oslo greiddi hin enski skurðlæknin, Dr. Rendle Short professari frá einum undri, sum ein vinmaður hansara hevði upplivað. Vinmaðurin var trúboðari í Kina.

Í hansara sókn herjaði í 1914 ein ræðulig hungursneyð. Har var eingin matur, og tað vóru fleiri vikur, til kornið varð búgvið at heysta. Tað hjálpti einki, sjálvt um onkur gav teimum pengar. Einki var at keypa.

Tað einasta, tey trúgvandi kundu gera, var at fara til Guds í bøn og bíða eftir Harrans hjálp. Tey vóru savnað í lítlu kirkjuni og róptu til Gud hin almáttuga í neyð síni. Triðja kvøldið fóru tey út og stardu upp móti himli. Tá sóu tey eitt myrkt skýggj á luftini, og tað kom nærri og nærri. Tá ið tað var beint uppi

yvir teimum, duttu nøkur smá svørt fræ niður, og tey vórðu liggjandi á jørðini. Tað gjørdist skjótt greitt, at fræini vóru eitt slag av korni. Tað kom so ríkiligt niður, so at øll høvdu nóg mikið av korni, til teirra egna var búgvið at heysta.

Short professari hevði fingið eina fulla fløsku av hesum korni, tá ið vinmaður hansara, trúboðarin, var heima og ferðaðist.

Men ikki nóg mikið við tí.

Fleiri ár seinni segði trúboðarin nøkrum trúgvandi vinum í Kalifornia frá hesi hending. Ein lækni var hjástaddur. Hann segði, at hann um ta tíðina, tá ið henda løgna hending fór fram, var í Kina mangar míl norðan fyri sóknina hjá trúboðaranum. Ein dagin herjaði ein ógvislig ódn, og ein full kornløða varð tikin av storminum og førd burtur. Træfjalirnar frá løðuni, sum vóru tungar, duttu niður á staðnum, har læknin búði, men kornið var av vindinum ført suður eftir. Hetta kornið var sostatt Guds svar upp á bønirnar hjá trúboðaranum og teimum trúgvandi vinunum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Endatíðin

Aleksander Hvass, sum gongur á lærda háskúlanum í Kristiansand, var gestur á Visjon Norge hjá Rolf Ruud í Norsk Indremisjon. Har greiddi hann frá endatíðini:

Hjá Dánjali lesa vit um ta 70. árvikuna (Dán. 9). Ein árvika er 7 ár. Tað, sum vit bíða eftir nú, er hin síðsta árvikan, tey síðstu 7 árini. Vit vita ikki, nær vit koma inn í hesi ár, fyrr enn templið hjá jødum er endurreist, og jødar fara at ofra djór aftur.

Tað kann ganga við rúkandi ferð. Gud sigur sjálvur, at „móti endanum skal eg gera tað í bræði“ (Róm. 9,28 og 16,20). Uppi á tempulfjallinum standa tvær moskur, Klettamoskan og Al Aksamoskan, so har er ikki nógv pláss eftir. Men tað er pláss at byggja hitt Heilagasta og hitt Allarheilagasta, men ikki forgarðin. Hvat sigur Skriftin. “Mær varð fingið rør, líkt einum stavi, og sagt varð: “Statt upp og **mála tempul Guds** og altarið og teir, sum har tilbiðja! **Men forgarðin**, sum er uttan fyri templið, **skalt tú** lata vera uttanfyri og **ikki mála** hann,

tí at hann er givin fólkasløgunum, og tey skulu traðka undir fótum hin heilaga staðin í fýrati og teir mánaðir (t.e. 3½ ár).“ Opb. 11,1–2.

Í dag er alt til reiðar til templið, ja, lutirnir eru enntá settir saman. Serligir menn eru lærdir upp til prestatænastuna, og tey hava til reiðar kýr, sum eingi lýti hava.

Longu í juli 2000, tá ið Bill Clinton, Yasser Arafat og Ehud Barak tingaðust um Camp David avtaluna, spurdi Clinton Barak, um jødar vóru villigir at lata Gasa og 90–95% av Vestara Áarbakka frá sær, um teir sluppu at byggja templið uppi á tempulfjallinum, minus forgarðin, og Barak segði ja, tí templið er altavgerandi fyri teir. Men Arafat segði nei.

Í dag, har Hamas hevur leiðsluna, tykist tað ógjørligt; men tað kann skifta skjótt. Tá ið helvtin av hesum 7 árum (3½ ár) er farin, setir Antikrist seg í Guds tempul og steðgar ofringunum (Dán. 9,27). Tá síggja jødar, at teir hava gjørt sáttmála við hin ónda, og teir slíta hann.

Tá verða hini trúgvandi rykt upp frá hesi jørð og heim í himmalin. Tí trúgva vit.

*Effie Campbell* umsetti.

# Hvussu er tín andaligi hungur?

„Mítt hjarta talar til tín: Søkið ásjón mína! Harri, eg søki tína ásjón.“ Sálm 27,8.

Um tú hvønn dag brúkar nógvar tímar at hyggja í sjónvarp, og tú ikki kanst finna nakrar minuttir til bøn og bíbliulestur, so hevur tú ein trupulleika við tínum andaliga matarlysti – ein trupulleika, sum krevur títt uppmerksemi. Tað nyttar lítið at eiga einar tríggjar – fýra Bíbliur, og eingin verður latin upp.

*e.c.* ums.

---

Tað er betri at liva eitt ríkt lív – enn eitt lív í ríkidømi.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8. nov. | Tekstur: | Matt. 28, 18–20; Mark. 10,13–16; 1 Pæt. 1,3 | bíbliuorð: | Mark. 16,16a |
| 15. nov. | Tekstur: | Matt. 26, 26–29 | bíbliuorð: | Jóh. 6,48 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 24*** ***22. november 2020*** ***80. árg.***

# Tápuligi gudloysingurin

*„Í hjarta dárar siga: „Ei nakar Gud er til.“ Sálm. 14,1.*

Gudloysi, ateisma, er tápuligt. Fólk siga: „Ein gudloysingur hevur somu grundgeving ikki at leita upp Gud, sum ein tjóvur hevur fyri ikki at leita upp politiið. Ofta er errinskapur innasta kjarnan í gudloysinum. Uttan Gud verður tú tín egni gudur, og tað merkir, at eingin hægri makt er til enn tú sjálvur! Men Bíbliunnar Gud prógvar sína veru á tríggjar mátar:

**1) Skapningurin.** Mong av teimum, sum í dag sita í fongsli, vórðu ikki tikin á gerningsstaðnum, og ofta vóru eingi vitni til teirra brotsgerð. Hvat var tað meðni, sum feldi tey? Fingramerki! DNA! Skapningurin ber Guds fingramerki og DNA. „Lítið upp móti himni! Hvør hevur skapað hesa ørgrynu av stjørnum? Hann, sum eftir tali leiðir her teirra fram og nevnir tær allar at navni, mikil í megi og veldismátti, so at eingin teirra vantar.“ Jes. 40,26.

**2) Golgata.** Í Guds skapningi sært tú kraft hansara, við krossin sært tú kærleika hansara til tín. Í skapninginum sært tú hond hansara, í krossinum sært tú hjarta hansara.

**3) Samvitskan.** Gud revsar heidningarnar, tá ið teir synda, sjálvt um teir ongantíð hava kent Guds skrivaðu lóg; tí djúpt í hjarta sínum duga teir at skilja rætt frá órætti. Guds lóg innan í teimum sigur, hvat ið teir skulu gera, og samvitska teirra annaðhvørt ákærir ella verjir teir. Róm. 2,12–15.

Samvitskan virkar, sum hevur tú eina Bíbliu inni í sál tíni. Eingin verður føddur við ongari. Franski gudloysingurin

Voltaire segði: „Tólv fiskimenn máttu byggja kristindómin upp. Eg skal vísa verðini, hvussu ein fiskimaður kann avoyða hann.“ Eftir at Voltaire var deyður, gjørdist heim hansara størsta Bíbliu-útbreiðslu-miðstøð í Evropa. Vit taka samanum: Voltaire er deyður – Gud livir! Gudloysi er eitt spæl, sum krevur eina velduga íløgu. Tá ið alt kemur til alt: Hvat um Gud er til, og tú ein dag skal standa framman fyri honum?

*„...et Ord til Dagen“ - Effie Campbell* umsetti.

# Angist farsóttin

Her tosa vit ikki um óttan fyri t.d. at brenna seg á einari kókiplátu. Tað er ein natúrligur innbygdur ótti, sum skal verja okkum, so vit ikki koma til skaða.

Men tað er ein mótloysis andi til, ein ræðslu andi, sum bindur og lammar. Í 2. Tim. 1,7 stendur: „Tí at ikki gav Gud okkum mótloysis anda, men kraftar og kærleiks og hóvsemis anda.“

Gudsótti er sunnur og neyðugur. Men hin lammandi óttin er ein andi úr myrkursins ríki.

Vit Jesus-trúgvandi hava helst ongantíð havt betri møguleikar gjøgnum lív og orð at vísa og sýna fram Sálm 23,4 mitt í einari truplari tíð, nú korona farsóttin herjar: „Gangi eg í dimmum dølum, einki ilt eg óttist. Tí tú (Hin góði Hirðin) ert við mær, tín stavur og tín keppur, teir ugga meg.“

Tað er í kreppum og ódnum, at vit við Guds náði kunnu vísa heiminum, at tað er trygt at vera ein, sum fylgir Jesusi eftir. Eg óttist einki menniskja, men Gud. Sjálvt um eg gangi í dali deyðaskuggans, óttist eg ikki. Jú meira tíð vit brúka við Jesu føtur, jú minni óttast vit. Tí í hansara fullkomna kærleika verður allur ótti rikin út.

*Effie Campbell* umsetti.

# Fyll lampuna støðugt við olju

Mín morgunlestur hevur verið um tær 10 brúðarmoyggjarnar, sum fóru út at møta brúðgóminum. Allar høvdu lampur við, tað vil siga, at tað er myrkt, og javnan skalt tú fylla meiri olju á eina oljulampu. Tað havi eg roynt, og tað merkir, at eg má vera virkin og fara at keypa mær olju í góðari tíð, og javnan

skal olja fyllast á. Skrivað stendur, at allar fóru avstað at møta brúðgóminum...

Og ja, vit hava øll verið í einum brúdleypi og verið boðin langt frammanundan. Vit sita og bíða eftir, at brúðurin skal koma til sjóndar, og ein skjálvti av spenningi fer gjøgnum samkomuna, og brúðgómurin stendur ofta við gleðistárum og sær brúðrina koma ímóti sær.

Vit hava eisini fingið eina innbjóðing at møta Jesusi í himmalsins brúdleypssali. Og vit hava tikið ímóti innbjóðingini og sagt ja takk, tá ið vit tóku ímóti frelsuni. Vit reinsa lív okkara í Guds náði. Tað vil siga, vit verða ílatin tey hvítu klæðini. Vit eru dagliga saman við brúðgómi okkara í teimum brøvunum, hann hevur skrivað til okkara í Bíbliuni. Vit tosa við hann í bønini. Vit hava samband við hann í okkara tonkum, í okkara anda. Við eru saman við øðrum, sum eisini skulu við til veitsluna. Vit gleða okkum. Og ja, so eru tað tey, sum einaferð søgdu ja við Jesus, og sum hava valt at ganga aðra leið. Tey gloymdu innbjóðingina. Tey fáa ikki fylt olju á lampuna, og ljósið sloknar.

Teir síðstu dagarnar havi eg rannsakað meg sjálva og kannað eftir, um eg eri á kvølfulla vegnum ella á ævinleikans vegi. Eg eri eitt sindur bivandi og ikki púra trygg. Eg má javnan royna meg framman fyri Harra mínum við at søkja andlit hansara og lata meg fylla við andanum, tí eg vil ikki standa uttanfyri og ikki verða afturkend til brúdleypsveitsluna.

Kanna teg sjálva inni fyri Gudi í orði og bøn. Lat teg fylla við nýggjari olju, meðan tú sigur: "Her eri eg, Gud, fyri andliti tínum, tala við meg og fyll meg við tínum tonkum og tínum vilja.

Má Harrin signa dagin fyri tær. *Effie Campbell* umsetti.

# Trúboðara-arvurin

Susanna Brännstrøm úr Pionerkirkjuni í Bergen hevur Kina-trúboðarablóð í æðrunum. Fýra av hennara langommum og langabbum vóru trúboðarar í Kina. Har var omma hennara – mamma til mammuna – eisini fødd, og har starvaðist hon eisini seinni saman við manni sínum.

Tá ið Dagny, langomma hennara, og maðurin Robert skuldu fara heim eftir at hava verið úti á trúboðara-akrinum í meir enn tretivu ár, gjørdist Robert sjúkur. Arbeiðið á trúboðarastøðini,

sum tey høvdu bygt upp, høvdu tey latið upp í hendurnar á kinesarum. Nú vóru bara tvær vikur eftir, til tey skuldu fara avstað med alla. Robert versnaði stórliga. Ein dagin, tá ið Dagny kemur inn á sjúkrarúmið, er ein himmalskur dámur inni har.

„Eg síggi himmalin," sigur Robert.

Tey høvdu mist eina dóttur í Kina, og konan spyr, um hann sær hana. Hann svarar játtandi og leggur afturat, at hann eisini sær mangar av teirra trúboðaravinum, sum doyðu í Kina.

„Hvussu sær himmalin út?" spyr Dagny so.

„Himmalin er fullur av kinesarum!" sigur Robert og lýsir av gleði. Lítla løtu seinni var lív hansara endað her á jørð.

Tá ið Dagny fer heim til Skandinavia, er tað við vissuni um, at hetta var vert prísin, alt stríðið og allan saknin. Tað, vit sáa, hevur lívsmegi og ber frukt, bæði í hesum lívi og hinumegin.

„Tað er so gott at vita, tá ið hon fór heim einsamøll, at tað var vert stríðið og strevið," sigur langommudóttirin, Susanna, sum sjálv hevur eitt bankandi hjarta fyri kinesarum.

Í ár 2000 hevði Susanna hug at vitja milliónbýin Panjing, har omman var borin í heim og vaks upp. Hon hevði onga adressu, og tað kundi vera vandamikið at sneyta ov nógv. Hon kom til býin og gekk og mól ymsastaðni. Brádliga sá hin ein lítlan kross á einum húsum.

„So er ein kirkja her, meðni," hugsaði hon. „Í bakgarðinum var ein gamal maður við longum hvítum skeggi, sum bjóðaði mær te. Í tí lítla rúminum síggi eg brádliga eina mynd av Martini, ommubeiggja, og eg finni útav, at eg eri á trúboðarastøðini, sum langomma og langabbi byrjaðu. Tann gamli kinesarin kendi ommu mína. Vit bóðu og sungu sálmar saman. Hann á kinesiskum og eg á enskum. Og so spurdi hann eftir Bíblium. Eg hevði ongar at geva ta ferðina," endar Susanna Brännstrøm, sum helst skjótt fer ein túr yvir aftur hagar.

*„Sporos" – Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 22. nov. | Tekstur: | Matt. 14,23; Jóh. 11,41–42; 17,9; Luk. 22,41–43; 23, 34 + 46 | bíbliuorð: | Job. 22,27a |
| 29. nov. | Tekstur: | Áps. 12,1–17; Matt. 7,7–8 | bíbliuorð: | Matt. 7,7 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74